# Frágreiðing

# um

# vinnubann

INNIHALDSYVIRLIT


| | | Síða |
|---|---|---|
| **Inngangur** | | 1 |
| **Kap. 1** | Hvat er misnýtsla av húsagangi | 3 |
| **Kap. 2** | Lóggávan í Føroyum | 5 |
| | Partafelagslógin og smápartafelagslógin | 6 |
| | § 79, 2. stk. í revsilógini | 7 |
| | Lóggáva um vinnulógir | 9 |
| **Kap. 3** | Reglurnar um vinnubann í fremmandum rætti | 10 |
| | Danmark | 10 |
| | Vinnulógir | 10 |
| | Revsilógin | 11 |
| | Strámansvirksemi | 12 |
| | Parta- og smápartafelagslógin | 12 |
| | Royndirnar av reglunum | 14 |
| | Svøríki | 15 |
| | Núverandi lóggáva | 16 |
| | Tillagingartrupulleikar | 17 |
| | Umhugsanir | 18 |
| | Noreg | 18 |
| | Finnland | 20 |
| | Ongland | 21 |
| **Kap. 4** | Umhugsanir og tilmæli | 23 |
| | Umhugsanir | 23 |
| | Tilmæli | 24 |

# Inngangur

Tann 18. mai 1993 avgjørdi landsstýrið at seta ein arbeiðsbólk við hesum arbeiðssetningi:

"Til landsstýrisfund 11. mai 1993

Hóast landskassin hevur lagt 100-tals miljónir út í vinnuligum veðhaldum, sum eru vorðin effektiv tey seinastu árini, er landskassin framvegis bundin av 360 mió. kr. í veðhaldum til vinnuna á sjógvi og landi.

Av hesum eru 81 mió. kr. veðhald til fiskavirki og 237 mió.kr. veðhald til skip.

Mong skip eru lýst til tvingsilssølu í seinastuni, og vandi er tí fyri, at útleggini úr landskassanum verða stór og væl meira enn tær 150 mió.kr., sum eru settar av á fíggjarlógini 1993.

Tað er hugsandi, at skipini verða lýst til sølu og fara ígjøgnum eina tvingsilssølu við tí eina endamáli at fáa landskassan at leggja út, so at skuldin í skipinum minkar samsvarandi. Síðani keypa somu eigarar skipið aftur.

Hetta haldi eg ikki vera í samsvari við ætlanina við almennum veðhaldum og als ikki í samsvari við góðan vinnulívsmoral. Mær er kunnugt, at í øðrum londum eru lógir og reglur, sum forbjóða fólkum, ið eru farin á húsagang, at reka vinnu í ávíst áramál.

Eg skjóti tí upp, at landsstýrið beinanvegin setir ein arbeiðsbólk

1) at kanna, hvussu hesar skipanir eru í nøkrum londum, og
2) at gera tilmæli um, hvussu ein slík skipan eigur at vera í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin eigur at vera liðugur við sítt arbeiði í so góðari tíð, at lógaruppskot um neyðugt kann leggjast fyri løgtingið á Ólavsøku 1993.

Í Tinganesi, 10. mai 1993

Finnbogi Ísakson (sign)"

Arbeiðsbólkurin hevur sostatt fingið til uppgávu

1) at kanna hvørjar reglurnar eru viðvíkjandi vinnubanni vegna húsagang í øðrum londum, og
2) hvussu ein møgulig skipan kann verða í Føroyum.

Av tí at misnýtsla kann koma fyri, uttan at talan er um húsagang, hevur bólkurin mett tað vera neyðugt at umhugsa spurningin um vinnubann í einum víðari høpi enn í samband við húsagang.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við arbeiðið áðrenn Ólavsøku.
Fyrsti fundur í bólkinum var 26. mai, og hevur bólkurin síðani havt 10 fundir.

Bólkurin hevur kannað hvussu skipanirnar við vinnubanni eru í Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi og Onglandi, og hevur danskt tilfar í høvuðsheitunum verið nýtt.

# Kap. 1.

# Hvat er misnýtsla av húsagangi

Misnýtsla av húsagangi, kann í stuttum sigast at vera misnýtsla av teirri avmarkaðu ábyrgdini sambært partafelagslógini, soleiðis at henda misnýtsla hevur húsagang sum fylgju.

Henda misnýtsla kann henda á ymiskan hátt, t.d.:

A) Føri, har ein persónur í einum lutfalsliga stuttum tíðarskeiði hevur verið uppí húsagangum, ella upploysing av feløgum og har orsøkin ikki sæst av hava verið versnandi tíðir, manglandi royndir ella líknandi, men harafturímóti sær út til at vera, at persónurin eyðsýnt manglar vilja til virkið og ábyrgdarfult at reka viðkomandi virki/felag.

B) Føri har ein húsagangur/upploysing er ein fylgja av gerðum, ið ikki eru vinnubúskaparliga grundaðar og við hvørjum ein fyritøka hevur minkað sínar ognir ella økt sína skuld á ein sovorðnan hátt, at útlitini hjá ognarunum at fáa teirra áogn er versnað ella heilt burtur.

C) Føri har fleiri virkir/feløg eru farin á húsagang/uppløyst eftir at ognirnar við virksemi millum virkini/feløgini eru settar í eftirverandi virkið/felagið.

D) Føri, har eitt felag er nýstovnað ella keypt sum liðugtstovnað skuffufelag, og har endamálið við hesum sær út til at hava verið at fara á húsagang ella at verða uppløyst tá fyrsta roknskaparárið endar við tapi fyri landskassan sum fylgju. Felagið hevur soleiðis ikki verið gjaldført alla sína livitíð, men hevur yvirlivað í nevnda tíðarskeiði vegna gjaldsfreistir bæði frá almennum og privatum ognarunum.

E) Føri, har ein persónur ognar sær partabrævameirilutan ella meirilutan í einum smápartafelag, sum ikki áður hevur verið í eftirstøðu og har tað sær út, sum endamálið er at misnýta gjaldstreytirnar hjá almennum og privatum ognarum, áðrenn felagið fer á húsagang ella verður uppløyst.

Ein miðil til at fyribyrgja misnýtslu av húsagangi kann verða forboð móti at reka vinnu.

Hetta forboð kann verða givið við støði í hvørjum máli sær ella kann forboðið verða givið uttan at mett verður um tað einstaka málið, nevniliga soleiðis, at lýkur tú treytina um at verða farin á húsgang, so fært tú vinnuforboð ella húsagangskarantenu.

Reglur um húsagangskarantenu byggja á ta fortreyt, at ein húsagangur vanliga skyldast lastverdugum viðurskiftum í leiðsluni av felagnum. Henda fortreyt er ikki altíð haldbar.

Nógvir húsagangir skyldast marknaðarviðurskiftunum her heima ella í útlondunum, ofta saman við fallandi kappingarevni vegna lønar- og prísħækkingar. Eisini kann orsøkin vera, sum vit nú síggja her heima, at t.d. rávørugrundarlagið er burtur.

Tí kann tað tykjast sera órímuligt at leiðslan, sum hevur stríðst fyri at halda virkinum gangandi og harvið at varðveita týdningarmikil arbeiðspláss, skal verða rakt av einum vanligum hugsunnarhátti um, at eitthvørt er at lastast henni, og at hon tí eigur at verða revsað.

Hin møguleikin hjá leiðsluni hevði verið, at hon gavst við virkinum so tíðliga, at tað slapst undan húsagangi.

Automatisk húsagangskarantena kann fáa óhepnar fylgjur á tann hátt, at góðir leiðarar og nevndarlimir ikki fáast til fyritøkur, ið eru illa fyri. Dugnalig fólk, sum møguliga kundu havt fingið fyritøkuna á føtur aftur ynskja als ikki at átaka sær uppgávuna. Tey vilja ikki finna seg í at verða gjørd til syndabukkar um tað hendir, at felagið hóast stór orka verður løgd í tað, fer á húsagang.

Fyri vinnuadvokatar kann tað, at átaka sær nevndarstarv vera ein natúrligur og ofta neyðugur liður í teirra yrkisliga virksemi - ein "húsagangskarantena" fer fyri teir at virka sum eitt yrkisbann.

# Kap. 2.

# Lóggávan í Føroyum

Í Føroyum er ikki nøkur lóggáva galdandi, ið er ætlað at forða fólki í at misnýta reglurnar um húsagang, men eru innan vinnuøkið nýliga komnar í gildi fleiri lógir og eru aðrar samtyktar at koma í gildi 1. januar 1994, sum meira ella minni kunnu virka fyri eini minking av misnýtsluni.

Hesar lógir koma at hava eina munandi ávirkan á vinnuøkið. Bólkurin hevur tí lagt størsta dentin á at lýsa hvussu rættarstøðan verður tá hesar nýggju reglurnar koma í gildi.

Talan er um hesar lógir:

1) Ársroknskaparlógin, jbr."Anordning nr. 248 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v."
2) Smápartafelagslógin, jbr. "Anordning nr. 249 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber."
3) Partafelagslógin, jbr. "Anordning nr. 250 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber."

Harafturat kunnu nevnast:

4) Lóg um ávís lánsfeløg, jbr. "Anordning nr. 245 af 3 maj 1993 om ikrafttræden på Færøerne af lov om visse kreditinstitutter." Lógin kom í gildi 1. juli 1993.
5) Banka- og Sparikassalógin, jbr. "Anordning nr. 246 frá 3. maj 1993 om ikrafttræden på Færøerne af lov om banker og sparekasser m.v." Viðmerkjast kann, at lógin viðvíkjandi bankum fekk gildi 1. juli 1993 og viðvíkjandi sparikassum 1. januar 1994.
6) Løgtingslóg nr. 119 frá 21. mai 1993 um skrásettar grannskoðarar. Lógin fekk gildi 1. juli 1993.
7) Løgtingslóg nr. 120 frá 21. mars 1993 um løggildar grannskoðarar. Lógin fekk gildi 1. juli 1993.
8) Umframt, at hesar vinnulógir koma í gildi, hevur løgtingið samtykt at setast kann í gildi fyri Føroyar § 1 í lóg nr. 385 frá 10. juni 1987 "om ændring af straffeloven og

retsplejeloven (økonomisk kriminalitet).

9) Harafturat eru við kunngerð nr. 22 frá 27. januar 1993 settar í gildi strangari reglur viðvíkjandi minstukrøvum til bókhald og roknskap.

Av hesum lógum hevur bólkurin serliga viðgjørt lógirnar nevndar í nr. 2, nr. 3 og nr. 8.

## Partafelagslógin og smápartafelagslógin

Í Føroyum er í løtuni galdandi gamla danska partafelagslógin frá 1930, har kravið til partapening er 10.000 kr.

Við fyriskipan nr. 249 og 250 frá 3.maj 1993 verða pr. 1. januar 1994 settar í gildi tær donsku lógirnar frá 1973 viðv. smápartafeløgum og partafeløgum.

Krøvini í galdandi og nýggju lógunum til stovnarnar eru, at teir eru myndugir og hava ræði á búgvi sínum.

Sambært galdandi partafelagslóg, kann eitt felag halda fram við virki sínum, sjálvt um tað er insolvent. Í løtuni er tí ikki galdandi nøkur skylda hjá føroysku partafeløgunum til at fara á húsagang sjálvt um eginpeningurin teirra er negativur.

Við nýggju lógunum verða hesi viðurskifti munandi broytt.

Viðvíkjandi smápartafeløgum kemur tann reglan at galda, at sambært grein 85 a í lógini um smápartafeløg skal aðalfundur verða hildin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at helvtin av partapeninginum er mistur, og skal aðalfundurin tá gera uppskot um hvussu partapeningur skal útvegast aftur, ella um felagið vegna fíggjarstøðuna skal gevast.

Í partafelagslógini er í grein 69 a bert ásett, at nevndin í førum har felag hevur mist helvtina av sínum partapeningi skal kalla inn til aðalfund, fyri at viðgera fíggjarstøðuna og gera uppskot um hvussu neyðugur partapeningur kann útvegast aftur ella avtøku av felagnum. Herí liggur tó ikki einn skylda til at fara í likvidatión.

§§ 69 a og 85 a koma tó ikki í gildi fyrr enn 5 ár eftir at lógin er komin í gildi, t.v.s. 1. januar 1999.

Tað verður ikki longur gjørligt hjá feløgunum at fara í sjálvbodna insolventa likvidatión, og feløg kunnu bert verða upployst/avtikin av skiftirættinum t.v.s. við trotabúarviðgerð. Harafturímóti er framvegis einki til hindurs fyri, at felag kann fara í sjálvbodna solventa likvidatión.

Tvingsilsavtøka kann nú vera sett í verk um felagið ikki sendir inn roknskap fyri 1 ár. Eftir galdandi reglum kann tvingsislavtøka vera sett í verk, um roknskapurin ikki er latin inn í 10 ár.

Krøvini til partapening í partafeløgum eru sett til 500.000 kr. og fyri smápartafeløg til 80.000 kr. Fyri partafeløg, ið eru skrásett áðrenn nýggju lógirnar koma í gildi, ásetir yvirgangskipanin eina 3 ára freist fyri at fáa partapeningin uppá 500.000 kr. Um hetta ikki er gjørt innan ásettu freist, tekur skrásetingarmyndugleikin felagið av. Hesi feløg kunnu tó við at hava ein partapening uppá 80.000 kr. eftir nærri ásettum treytum verða umskrásett til smápartafeløg.

Í galdandi partafelagslóg er einki beinleiðis forboð móti partaeigaralánum, men hesi viðurskifti verða nú eisini broytt við reglunum í § 115 í nýggju partafelagslógini og § 84 í smápartafelagslógini.

Í nýggju lógunum fær føroyskur skrásetingarmyndugleiki fleiri uppgávur, enn hann hevur í dag, og er hetta serstakliga eftirlitsuppgávur í sambandi við stovnanina og broytingar í skrásettu viðurskiftum felagsins.

## § 79, stk. 2 Í revsilógini

Tann 26. januar 1993 samtykti løgtingið, at setast kann í gildi fyri Føroyar lóg um broyting í revsilógini, og tann 5. mars boðaði landsstýrið Ríkisumboðnum frá, at broytingin kann setast í gildi.

Tá Løgmálaráðið hevur gjørt kongaligu fyriskipanina, ið skal seta lógina í gildi fyri Føroyar, verður hon lýst í Kunngerðablaðnum.

Eftir higartil galdandi reglum í § 78 og 79 í revsilógini hevur persónur; sum verður dømdur fyri revsiverd viðurskifti, samstundis kunna verið frádømdur rættin at reka eitt virksemi, ið krevur eina serliga almenna løggilding ella góðkenning, um viðurskiftini grunda ein nærliggjandi vanda fyri misnýtslu av starvinum. Undir serstøkum umstøðum kann persónur eisini missa rættin at reka annað virksemi, ið ikki krevur eina serliga almenna løggilding ella góðkenning.

Lógarbroytingin fer at bera í sær, at tá dómur fyri revsiverd brot verður sagdur, kann persónur eisini verður frádømdur rættin at vera stovnari ella stjóri ella nevndarlimur í einum felag við avmarkaðari ábyrgd, ella einum felag, har serlig almenn góðkenning er kravd, ella einum grunni.

Tað, sum serliga hevur týdning, og sum verður ein stór broyting, er ásetingin um, at persónurin kann verða frádømdur rættin at vera stovnari, stjóri ella nevndarlimur í einum felag við avmarkaðari ábyrgd, tvs. serstakliga partafeløgum og smápartafeløgum.

Frádømingin hendir frá 1 til 5 ár, ella í óavmarkaða tíð, og kann rætturin meðan eitt mál verður viðgjørt avgera, at persónurin ikki skal kunna reka virksemið, til málið er endaliga avgreitt. Tá dómur verður sagdur í málinum, kann eisini verða avgjørt, at kæra ikki skal vera steðgandi.

Harafturat verður eisini sagt í lógini, at um ein persónur hjálpur einum persóni, ið hevur mist rættin at inna eitt virksemi, at inna hetta, kann hann eisini verða dømdur sambært revsilógini. Her er talan um tað, ið verður nevnt "strámannsvirksemi".

Tað er ein treyt, at viðkomandi verður dømdur fyri revsiverd viðurskifti, men ikki fyri brot á ávísa revsireglu. Heldur ikki er nakað krav um, hvussu stór revsingin skal vera. Talan kann sostatt vera um, at dømt kann verða, at missa vinnurættin, hóast eitt mál annars er endað við bót ella treytaðari revsing.

Aðrar treytir fyri frádøming eru, at talan er um serligt føri, og at nærliggjandi vandi skal verða fyri misnýtslu av starvinum,

Metast má, at alt í alt skal nógv til fyri, at dómstólarnir fara at nýta ásetingina í § 79, stk. 2, men greinin kann í sjálvum sær hava eina fyribyrgjandi ávirkan.

## Lóggáva um vinnuloyvir

Sambært galdandi lóggávu um vinnu, løgtingslóg nr. 33 frá 20. desember 1955 um vinnu v.m., krevst, umframt at viðkomandi skal lúka nøkur materiel krøv um danskan heimarætt, føroyskan bústað, aldur og at viðkomandi skal hava ræði á búgvi sínum, sum meginregla loyvisbræv til flest allar vinnur í Føroyum.

Við heimild í § 13 og § 14 í lógini er gjørd kunngerð nr. 34 frá 20. desember 1955 um handverks- og ídnaðarvinnu, ið ásetir hvat er at skilja við ávikavist handverk og ídnað, og sum sostatt krevur loyvisbræv.

Higartil hevur eingin heimild verið at sýta umsøkjara loyvisbræv ella annað serligt loyvi, sum verður kravt sambært lógini um vinnu ella aðra lóg, við teirri grundgeving, at viðkomandi hevur falna eftirstøðu til tað almenna. Heldur ikki hevur verið heimild at taka loyvið aftur frá viðkomandi við hesi grundgeving.

Tó er í løgtingslóg nr. 119 frá 21. mai 1993 um skrásettar grannskoðarar heimilað skrásetingamyndugleikanum at nokta viðkomandi upptøku í skrásetingini, um viðkomandi skyldar tí almenna kr. 50.000 og at taka rættin at vera skrásettur aftur, um viðkomandi skyldar tí almenna kr. 100.000. Viðvíkjandi løggildum grannskoðarum er sama galdandi sambært løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.

Hesar lógir hava báðar gildi frá 1. juli 1993.

# Kap. 3.
# Reglurnar um vinnubann í fremmandum rætti

## Danmark

Í Danmark finnast lógarásetingar, sum í ávísan mun eru ætlaðar at minka um vandan fyri misnýtslu av lógarreglunum fyri feløg við avmarkaðari ábyrgd og galdandi konkursskipanini, ella tað sokallaða " konkursryttaríðið".

Reglurnar eru í borgarligu revsilógini, í partafelagslógini, í smápartafelagslógini og í ymiskum vinnulógum.

Eins og í øðrum londum er fyribrigdið "konkursryttarí" ikki í sjálvum sær revsivert, men verður roynt í besta mun at gera lógarreglur, sum skulu minka um møguleikan fyri misnýtslu.

### Vinnuloyvir

Rætturin at vera sjálvstøðugt vinnurekandi eitt nú sum handilsmaður, handverkari og ídnaðarrekandi er sambært teirri donsku lógini um vinnu bert treytaður av, at viðkomandi hevur danskan heimarætt, danskan bústað og løgræði. Lýkur persónurin hesar treytirnar, hevur hann rætt at reka eitt nú nevndu vinnur uttan loyvis - ella vinnubræv, og tað er t.d. eingin treyt, at viðkomandi skal hava ræðið á búgvi sínum.

Í øðrum førum er ásett, at serligt vinnubræv krevst til at reka ávísa vinnu og harumframt almenn løggilding ella góðkenning, til m.a at reka vinnu sum tannlækni, apotekari, lækni, hýruvogns-førari og bussførari.

Partafeløg og smápartafeløg hava rætt til at reka vinnu, tá tey eru skrásett í partafelagsskránni - ella eru vorðin fráboðaði til skráseting sum felag undir stovnan.

Fyri onnur feløg er kravt, at stjórarnir og meirilutin av nevndarlimunum lúka treytirnar í vinnulógini.

I feløgum har luttakararnir ábyrgjast persónliga, eitt nú sum í íognarfeløgum, skulu allir teir luttakarar, ið eru persónliga ábyrgdarhavandi lúka nevndu treytirnar í vinnulógini.

Síðan 1991 hevur verið í gildi lóggáva sambært hvørjari vinna, ið krevur almenna løggilding ella góðkenning, hevur verið treytað av, at viðkomandi persónur ella felag ikki hevur almenna eftirstøðu uppá 50.000 kr. ella meira, og kann ein almenn løggilding ella góðkenning verða tikin aftur, um skuldin til tað almenna er 100.000 kr. ella meira.

Í Danmark verður mett, at lóggávan hevur virkað eftir ætlan, soleiðis at eftirstøðurnar eru minkaðar, og at hon hevur eina fyribyrgjandi ávirkan.

## Revsilógin

Sambært § 78 í donsku revsilógini er meginreglan hon, at revsiverd viðurskifti ikki føra við sær frátøku av borgarligum rættindum, sum t.d at reka vinnu.

Undantak frá hesi meginreglu er gjørd í § 78, stk. 2. og § 79.

Til 1987 kundi persónur, ið rak vinnu, sum kravdi almenna løggilding ella góðkenning, eftir § 78 stk. 2 og § 79, stk.1, í revsilógini í samband við dóm fyri revsiverd viðurskifti verða frádømdur rættin til framhaldandi at reka hesa vinnu, um umstøðurnar grundaðu ein vanda fyri misnýtslu av starvinum.
Frádømingin kundi eisini í serligum førum fevna um rættin til at reka aðra vinnu, ið ikki kravdi serliga løggilding.

Við lógarbroyting í 1987 varð frátøkan av vinnurættinum víðkað til eisini í serligum førum at umfata rættin til at vera stovnari, nevndarlimur ella stjóri í einum felag við avmarkaðari ábyrgd, einum felag ella felagsskapi, ið krevur serliga almenna góðkenning ella í einum grunni.

Frádømingin eftir hesum reglum kann verða frá 1 til 5 ár, og í ávísum førum í óavmarkaða tíð.

Noktan ella frádøming til at reka hesar serligu vinnur kann fara fram soleiðis:

1) fyrisitingarlig forðan (undir rættareftirliti) fyri at geva neyðugt loyvi tal at byrja eina vinnu, ið krevur serliga løggilding ella góðkenning,

2) rættarlig frátøka av loyvi at halda fram at reka vinnu, ið krevur almenna løggilding ella góðkenning.

3) rættarlig frátøka av rættinum at halda fram við aðrari vinnu og rættindunum til at vera stovnari, nevndarlimur ella stjóri í omanfyri nevndu feløgum, felagsskapum.

## Strámansvirksemi

Samstundis sum reglurnar í § 79 vórðu herdar, varð "strámansvirksemi" gjørt revsivert. Hetta virksemi fevnir um hjálp til persónar, ið hava mist rættin til at reka eina vinnu, til framhaldandi at reka somu vinnu. Revsingin er sekt, tó í serligum førum hefti.

Eisini varð revsingin herd fyri persónar, ið reka vinnu, uttan at hava kravda góðkenning, og fyri persónar, ið framhaldandi reka vinnu, hóast vinnurætturin er tikin frá teimum. Revsingin var til 1987 sekt, ella hefti upp til 3 mánaðir, og varð í 1987 herd til at verða sekt, hefti ella fongsul upp til 6 mánaðir.

## Parta- og smápartafelagslógin

Eftir § 3 stk. 3 í parta- og smápartafelgslógini skulu stovnararnir verða myndugir, og teir mugu hava ræði á búgvi sínum, t.v.s. ikki hava fráboðað gjaldssteðg ella verða undir húsagangsviðgerð. Umframt hesi krøv eru í donskum rætti ikki onnur krøv til hesar persónar, og heldur ikki til stjórar og nevndarlimir í slíkum feløgum.

Umframt hesar reglur eru aðrar reglur, ið hava verið mettar at verða fyribyrgjandi móti misnýtslu av húsagangi. Krøv um størri partapening hava eitt nú eisini verið nýtt í hesum samanhangi.

Krøvini til partapening eru hækkaði soleiðis:

| | smápartafeløg | partafeløg |
|---|---|---|
| 1930: | | 10.000 |
| 1973: | 30.000 | 100.000 |
| 1982: | 80.000 | 300.000 |
| 1991: | 200.000 | 500.000 |

Erhvervs- og Selskabsstyrelsen hevur í samband við stovnan og tá partapeningur verður hækkaður eftirlit við, at reiður peningur ella virðir svarandi til somu upphædd veruliga er latin felagnum, og at ognir, ið verða nýttar sum innskot í felagið veruliga hava tað uppgivna virðið. Váttan fyri hesum frá ríkisgóðkendum grannskoðara skal fyriliggja.

Krav er eisini, at ríkisgóðkendur ella skrásettur grannskoðari skal gera ótengda metan av innskotum, ið ikki eru reiður.

Forboð er sett fyri, at ognir hjá felagnum verða nýttar til fyrimuns fyri partaeigararnar ella teirra nærstandandi, bæði viðvíkjandi lánum (partaeigaralánum ) og tí, at felagið stillar fíggjarliga trygd teirra vegna.

Eisini er lógarásett, at felagið kann verða tikið av, um tað hevur mist helvtina av sínum partapeningi.

Skrásetingarmyndugleikin kann seta í verk avtøku av einum felag um innsendan av bert einum roknskapi manglar.

Hesar lógarásetingar hava nú verið í gildi í Danmark í mong ár, og vóru m.a. ætlaðar at hava eitt generellt alment fyribyrgjandi árin á misnýtslu av húsagangi. Í ávísan mun hava tær eisini verið við til at minka um misnýtsluna í Danmark. Hetta tí tær eitt nú tryggja, at feløgini ikki er "tømd " ella "tóm " longu frá byrjanini av, og tí at partafelagsskrásetingin hevur víðar heimildir til at fylgja og eftirkannað alla nýtslu av ognum felagsins, serstakliga um tær verða nýttar til viðurskifti, ið eru felagnum óviðkomandi.

## Royndirnar av reglunum

Men royndirnar í Danmark sýna, at tær herdu reglurnar fyri feløg tó ikki hava verið nóg mikið til at forða skipaðari "spekulation" i skuldarundanførðslu og við húsagang ella tvingsilsavtøku. M.a. er enn ikki sloppið undan, at partahavarar í smápartafeløgum framhaldandi tøma felagið fyri pening úr feløgunum uttan at nakað stórvegis verður gjørt, ella út frá verandi umstøðum kann verða gjørt, fyri at søkja at hesum lógarbrotum.

Eisini sýnist tað, sum tær herdu lógarásetingarnar hava ført til, at persónar bert hava funnið sær aðrar møguleikar til misnýtslu av húsagangsskipanini.

T.d. verður nú tosað nógv um m.a. tey mongu feløg, sum í staðin fyri at verða koyrd á húsagang í rúgvuvís verða tikin av av skiftirættinum. Harvið sleppa partaeigarar, nevnd og leiðsla sær undan eini nærri kanning av fíggjarligu viðurskiftum felagsins innan avtøkuna, tí peningur er ikki til staðar at seta í verk eina kanning av, um hesir í gerðum sínum í felagnum hava hildið seg innan lógarinnar karmar. Mett verður, at hendan øking av avtøkum av feløgum uttan nærri eftirkanning hevur ført við sær mong fyribrigdi av ólógligum partaeigaralánum - og allarhelst eisini fíggjarsvikum, ið aldri verða rættarfylgd.

Samanumtikið verður í Danmark mett, at komið er rættiliga langt ávegis við royndunum at forða fyri ella minka um misnýtsluna av felags- og húsagangsreglunum við at nýta vanligu revsi- og sivilrættarligu rættarfylgjurnar, men at mett verður, at teir ikki koma trupulleikanum heilt til lívs, ella nóg nøktandi til lívs við galdandi reglunum. Tí varð í 1991 settur ein bólkur at viðgera misnýtsluna av húsagangsskipanini og felagsreglunum, men enn er, so vítt vit hava

kunna fingið uppspurt, ikki komið annað alment fram um hetta, enn at arbeitt verður við tonkunum um "húsagangskarantenu".

## Svøríki

Fyri 1. juli 1980 kundi persónur, sum var farin á húsagang sambært konkurslógini ikki reka bókhaldsskyldugt virki so leingi húsagangurin vardi.

Við broytingum í konkurslógini, sum komu í gildi 1. juli 1980, kom eitt meira umfevnandi vinnuforboð í gildi, og var rættarúrskurður ein fortreyt fyri nevndu vinnuforboðum í hvørjum einstøkum føri. Forboðið kundi verða givið skuldarum, ið róku vinnu, og um skuldarin var eitt partafelag ella annar løgfrøðiligur persónur, kundi vinnuforboðið í ávísum føri verða givið honum, sum umboðaði ella hevði umboðað tann løgfrøðiliga persónin, ella sum í roynd og veru hevði havt leiðsluna ella fyrisitingina í felagnum. Ein fortreyt fyri at geva vinnuforboð var, at persónurin hevði handlað grovt ósámiligt mótvegis sínum ognarum, ella á annan hátt grovt hevði sett til síðis tað, sum hann hevði skyldu til í sínum vinnuvirksemi.

Vinnuforboð kundi eisini verða givið persóni, sum ferð aftaná ferð fór á húsagang, tí hann við sínum virksemi hevði sett til síðis tað, sum hann hevði skyldu til sum vinnurekandi, tá metast mátti, at vinnuforboð var neyðugt av serstøkum grundum.

Hann sum hevði fingið vinnuforboð kundi sum meginregla ikki reka bókhaldsskyldugt vinnuvirki. Hann kundi heldur ikki vera nevndarlimur ella í øðrum eginleika vera umboð fyri eitt partafelag, ella ávísar aðrar løgfrøðiligar persónar. Hann kundi heldur ikki í roynd og veru hava leiðsluna ella fyrisitingina av einum virki um hendi. Forboðið skuldi vera tíðaravmarkað til í mesta lagi 5 ár, men við einum ávísum møguleika fyri leingjan.

## Núverandi lóggáva

Tann 1. juli 1986 kom í gildi núgaldandi lóg um vinnuforboð. Reglurnar vórðu fluttar úr konkurslógini í eina serstaka lóg um vinnuforboð. Broytingin hevur ført við sær víðkaðar reglur um vinnuforboð fyri fyrst og fremst at forða ábyrgdarleysum vinnurekandi í at reka vinnu.

Víðkanin ber í stuttum í sær, at einum einstakum vinnurekandi ella umboð fyri løgfrøðiligan persón kann verða álagt vinnuforboð sjálvt um eingin húsagangur hevur verið. Lógarbrot, eins og tað, ikki at hava goldið skattir, tollir og gjøld til tað almenna, kunnu undir ávísum umstøðum føra til vinnuforboð. Eins og fyrr kann vinnuforboð harafturat í ávísum føri verða givið í samband við húsagang. Ein grundleggjandi fortreyt er, at viðkomandi grovt hevur sett til síðis tað, sum áliggur honum í vinnuvirksemi og at eitt forboð er neyðugt frá einum almennum sjónarmiði.

Eitt lógarbrot, sum førir eina ikki heilt stutta fongsulsrevsing við sær, eigur vanliga at føra við sær vinnuforboð. Eisini onnur brot, sum t.d. ávís brot viðvíkjandi bókføring og brot viðvíkjandi innheinting kunnu føra til vinnuforboð, um tey vera endurtikin í longri tíð ella fleiri ferðir.

Um talan er um gjaldundanlát kann vinnuforboð einans koma upp á tal, um upphæddin er sera stór, tí annars kann gjaldundanlát ikki vera sjálvstøðug grund fyri vinnuforboði. Fyrilit skal takast viðvíkjandi støddini á skuldini og hennara lutfalsliga týdningi í vinnuvirkinum. Fyrilit má eisini takast fyri, um talan er um eitt meira endaligt gjaldundanlát ella bara eina styttri varandi seinkan. Í seinasta førinum kann tað vera orsøk til at meta gjaldundanlátið sum lítið, hóast skuldin í sjálvum sær er stór. Tá talan er um endaligt gjaldundanlát og stórar seinkanir, er sjónarmiðið sjálvandi eitt annað.

Persónur, sum hevur fingið vinnuforboð, kann ikki reka vinnuvirki. Hann kann heldur ikki vera nevndarlimur, stjórnarlimur, stjóri ella varastjóri í partafelag ella í aðrar mátar vera umboð fyri partafelag.

Spurningar um vinnuforboð verða avgjørdir av rættinum og átalan verður førd av almenna ákæraranum. Er tað heilt greitt, at talan verður um at geva vinnuforboð, kann rætturin geva eitt fyribils vinnuforboð, til spurningurin um vinnuforboð er endaliga avgjørdur. Ein avgerð um fyribils vinnuforboð er galdandi beinanvegin, um ikki rætturin tekur aðra avgerð.

Hann, sum brýtur eitt givið vinnuforboð kann verða dømdur fongsulsrevsing í mesta lagi 2 ár (tá talan er um smá brot, bót ella fongsul í mesta lagi 6 mánaðir).

Førd verður ein skrá - tann sokallaða vinnuforboðsskráin - yvir vinnuforboð og fyribils vinnuforboð. Skráin verður førd manuelt, og verður gjørd við grundarlagi í fráboðanum frá rættinum. Dómstólurin skal eisini senda fráboðan um dómin ella avgerðina til tann eftirlitsmyndugleikan, sum skal hava eftirliti við, at forboðið verður hildið.

Vinnuforboðsskráin er almenn. Útskrift úr skránni, skal við jøvnum millumbilum verða send ymiskum myndugleikum, so sum partafelagsskránni og handilsskránni, men hesar skráir hava onga skyldu at føra vinnuforboðini í sína skrá.

## Tillagingartrupulleikar

Í tíðini 1. juli 1980 til oktober 1991 fingu tilsamans 465 persónar vinnuforboð. Ongin skrá er yvir, hvussu ofta ákærin hevur kravt vinnuforboð, men har hetta ikki hevur verið givið. Í oktober 1991 vóru 151 galdandi vinnuforboð. Til samanberingar kann verða nevnt, at í 1992 vóru 6.349 húsagangir í Svøríki.

Næstan øll vinnuforboð eru givin í samband við lógarbrot, ofta í samband við, at húsagangur kemur fyri ferð eftir ferð. Tað eru einans givin einstøk vinnuforboð við teirri grundgeving, at skattir v.m. ikki eru goldnir. Harafturímóti hevur tað, at ikki er goldið, saman við øðrum verið givið sum grund fyri forboðnum.

At vinnuforboð kann verða givið vegna tess, at skattir v.m. ikki eru goldnir, kann hava eina týðandi fyribyrgjandi ávirkan á viljan hjá tí vinnurekandi at gjalda.

Í einum tíggju ára tíðarskeiði hava sum sagt 465 persónar fingið vinnuforboð. Í sama tíðarskeiði eru einans 23 dómar sagdir fyri brot á vinnuforboð. Hetta tal tykist lágt, og ein orsøk kann vera, at tey sum fáa vinnuforboð, akta forboðið. Ein onnur orsøk kann vera manglandi eftirlit.

## Umhugsanir

Tað er dómstólurin, ið gevur vinnuforboð, og hetta tryggjar eina fjølbroytta viðgerð, og at rættartrygdin er í lagi. Talið á vinnuforboðum bendir á, at rætturin einans gevur vinnuforboð tá talan er um grov lógarbrot. Tað er sostatt ein avmarkaður bólkur av teimum, sum fremja fíggjarlig brotsverk, ið eru í vanda fyri at fáa eitt tílíkt forboð.

Í Svøríki verður mett, at núgaldandi reglur eru í lagi, soleiðis at ongin orsøk er at linka ella herða tær. Tó verður mett, at møguleikarnir hjá almenninginum at gera seg kunnigan við givin vinnuforboð kundu verið betri, t.d. skipanin við skrásetingini, og eisini, at givin vinnuforboð áttu at verið lýst, eins og húsagangir verða lýstir.

## Noreg

Í 1976 vórðu serligar reglur um húsagangskarantenu innførdar í Noregi. Reglurnar vórðu gjørdar í lógini um partafeløg.

Sambært hesum reglunum fingu persónligir húsagangsskuldarar automatiskt karantenu, um teir fóru konkurs.

Var debitor ein løgfrøðiligur persónur fingu fyrisitingarstjórar og nevndarlimir, ið høvdu verið í starvi árið fyri húsagangin, automatiskt karantenu.

Reglurnar um húsagangskarantenu høvdu við sær, at skuldarar ella - har skuldarin var eitt

felag - leiðslan hjá skuldaranum mistu rættin at stovna ella at gerast nevndarlimir ella fyrisitingarstjórar í einum nýggju partafelag.

Karantenan vardi í tvey ár frá húsaganginum.

Skiftirætturin kundi tó eftir áheitan gera frávik frá karantenuni. Onnur størv av sama slagi kundu eisini verða tikin frá viðkomandi eftir eini meting, sum skiftirætturin gjørdi í hvørjum føri sær.

Frá lógin kom í gildi til fyrst í 1983 fingu 6-7000 persónar automatiskt karantenu.

Hetta hevði við sær harðligar atfinningar frá norska vinnulívinum, við tað, at ført varð fram, at tað var tilvildarligt hvør varð umfataður av karantenuni, at hesi ofta einki høvdu gjørt, ið kundi leggjast teimum til last, at reglurnar forðaðu fyri, at nýggj virki komu, at tað gjørdi tað torført at fáa skikkað fólk at átaka sær nevndarsessir í partafeløgum.

Við grundarlagi í atfinningunum skeyt stjórnin upp, at reglurnar vórðu broyttar. Hetta var gjørt og vórðu tá eisini reglurnar fluttar úr partafelagslógini í konkurslógina.

Sostatt fær einhvør skuldari, sum fer á húsagang, ikki longur automatiskt karantenu. Í staðin skal skiftirætturin taka avgerð um húsagangskarantenu, í hvørjum einstøkum føri sær. Húsagangskarantenan kann verða nýtt um tað verður mett, at skuldarin vegna ábyrgdarleysa virkisførslu er ógnaður at stovna eitt nýtt felag ella at verða nevndarlimur ella fyrisitingarstjóri í einum felag. Tá avgerðin verður tikin, verður áherðsla løgd á, um tað, sum skuldarin hevur gjørt, gevur grundarlag fyri at seta hann í karantenu.

Umframt at fevna um persónligar skuldarar fevna reglurnar um húsagangskarantenu eisini um persónar, sum árið fyri, felagið fór á húsagang, annaðhvørt hava verið ábyrgdarhavandi luttakarar í einum felag ella samløgufelag, ella sum eitt eiti hava havt ella virka sum nevndarlimir ella fyrisitingarstjórar í einum partafelag ella einum samløgufelag.

Húsagangskarantenan hevur við sær, at viðkomandi í einum tvey ára skeiði frá húsaganginum

ikki kann verða stovnari ella átaka sær, ella í verunleikanum hava starv sum nevndarlimur ella fyrisitingarstjóri í einum felag, sum er nevnt omanfyri. Skiftirætturin kann avgera, at tvey ára freistin ikki skal roknast fyrr enn frá tí degi, rætturin tekur avgerð um karantenu.

Brot á avgerðina um karantenuna kann revsast við bót ella undir herðandi umstøðum fongsul upp í 3 mánaðir.

Handilsskrásetingin skal kanna, um fráboðanir um skráseting av nýggjum feløgum eru í samsvari við lóggávuna heruppií um fráboðanin er í stríð við eina møguliga húsagangskarantenu.

Upplýsingar um hesi viðurskifti vera ikki, sum er, latnar ímillum skiftiræ ttin og handilsskrásetingina. Tað er ikki eitt krav, at skrásetingarfráboðanini skal vera hjáløgd prógv fyri, at persónur ikki hevur húsagangskarantenu.

Í veruleikanum hava møguleikarnir fyri eftirliti tí verið avmarkaðir, og hetta ger, at tað er torført at siga, í hvønn mun tað eru hend brot á karantenureglurnar heruppií í hvønn mun strámenn verða nýttir til tess at sníkja seg uttan um reglurnar.

Í Noregi er ein sentral edv-skráseting tí nú við at verða gjørd.

## Finnland

Tann 1. januar 1986 kom lóg um vinnuforboð í gildi í Finnlandi. Hetta varð gjørt við eini broyting í konkurslógini.

Sambært lógini kann ein vinnurekandi, sum er farin á húsagang, og sum rekur vinnuvirksemi, sum lógin um bókføring fevnir um, fáa vinnuforboð. Harumframt kann persónur, ið seinastu tvey árini hevur havt persónligu ábyrgdina av einum felag, sum er farið á húsagang, umframt persónur, ið hevur verið nevndarlimur, stjóri ella í aðramáta hevur havt høvuðsábyrgdina av einum løgfrøðiligum persóni í tveimum teimum seinastu árunum fyri húsagangin, fáa

vinnuforboð.

Treytin fyri, at persónur kann fáa vinnuforboð er, at hann hevur borið seg grovt ósámiliga at mótvegis ognarunum ella í aðramáta ikki røkt sínar skyldur í sínum vinnuvirki. Sum dømi um ósámiliga atferð kann nevnast, at viðkomandi hevur falsað bókføringina, ella gjørt okkurt, ið líkist skuldarasviki. Tað er tó ikki ein treyt fyri at fáa vinnuforboð at ákæra verður reist fyri revsiverd viðurskifti.

Vinnuforboðið hevur við sær, at viðkomandi í einum tíðarskeiði frá 2 til 5 ár ikki sleppur at reka vinnu, ið er umfatað av lógini um bókføring, at verða nevndarlimur, fyrisitingarstjóri ella í aðramáta hava leiðsluna í einum felagi. Um so er, at serligar umstøður tala fyri tí, kann vinnuforboðið verða avmarkað til ávís sløg av vinnu, og hetta kann eisini verða gjørt fyribils.

Tað er rætturin, ið tekur avgerð um vinnuforboðið, eftir áheitan frá almenna ákæranum.

Brot á vinnuforboð verður revsað við bót ella fongsulsrevsing í mesta lagi í tvey ár. Persónur, ið er strámaður fyri ein annan, við tí í hyggju at sníkja seg uttan um vinnuforboðið, kann eisini fáa álagt vinnuforboð.

## Ongland

Sambært konkurslógini frá 1976 kann rætturin koyra ein stjóra ella nevndarlim frá, sum hevur verið uppi í tveimum konkursum seinastu 5 árini, og sum rætturin metir vera óegnaðan at hava leiðsluna í feløgum.

Avgerðin hevur við sær, at viðkomandi verður noktað at taka lut í leiðsluni av einum partafelag ella smápartafelag og at stovna tílík feløg í 5 ár.

Harafturímóti forðar avgerðin ikki fyri, at tann frákoyrdi rekur sjálvstøðugt vinnuvirksemi við persónligari ábyrgd til dømis eina einstaklingafyritøku. Brot á avgerðina kann verða revsað við bót og /ella fongsulsrevsing í upp til 2 ár.

Í hesum sambandi kann eisini verða nevnt, at frá 1981 kann forboðið, sambært partafelagslógini verða givið í 15 ár í førum har felagið ikki fer á húsagang, um so er, at talan er um revsiverd viðurskifti í sambandi við vinnuvirki, ella viðkomandi ferð eftir ferð hevur brotið roknskaparskyldu felagsins.

Henda avgerðin avmarkar - á sama hátt sum avgerðir tiknar eftir konkurslógini - bert møguleikan fyri at reka vinnuvirksemi við avmarkaðari ábyrgd.

Eingin sentral skráseting verður gjørd yvir, hvørjir persónar eru fevndir av avgerðunum um vinnuforboð, ella sum í aðramáta eftirkannar um brot verða gjørd á avgerðirnar.

Vísandi til, at lógargrundarlagið á vinnuøkinum verður munandi broytt frá 1. januar 1994, verður mælt til at fylgja við royndunum av hesari lóggávu og annars at hava eitt vakið eyga við, hvat hendir á hesum økinum í øðrum londum.

Tórshavn, tann 21. juli 1993

Ann-Mari Dam          Gurið Joensen          Høgni J. Høgnesen